gult2 cyan2 magenta2 svart2










gult3 cyan3 magenta3 svart3

Rektarin á Læraraskúlanum:

# Nýggir skúlatankar eru provokerandi

**Orsøkin til stríðið á Føroya Læraraskúla, um hvussu skúlin skal stýrast, er, at summir nemingar hava ilt við at góðtaka tann frálæruhátt, sum verður nýttur á skúlanum. Hetta heldur Pauli Nielsen, rektari, sum veruliga hevur verið í andgletti seinastu tíðina**

LÆRARASKÚLIN
*Stefan í Skorini*

– Atfinningarnar í Fregnum kennast sum ein lortabytta omanyvir høvdið, sigur rektarin á Læraraskúlanum, Pauli Nielsen í viðmerking til næmingarnar á skúlanum.

Fregnir hava samrøðu við tríggjar limir í Ráði teirra lesandi í blaðnum. Teir vilja vera við, at skúlin er tað reina kaos, tí eingir karmar eru, og reglur vera ikki fylgdar, so næmingarnir missa áhugan fyri at ganga á skúlanum. Leiðslan skal skiftast út, so skil kemur á skúlan, siga næmingarnir.

Pauli Nielsen sigur, at hann tekur ákærurnar í størsta álvara, og tí fer hann at taka málið upp á fundi við lærarar.

– Um mín stýring hevur tað við sær, at vit fáa tað mótsatta av tí, sum vit ætla, so mugu trupulleikarnir umrøðast ordiliga, sigur Pauli Nielsen um kreppufundirnar, sum hava verið á skúlanum. Tí verður støðan umrødd í næstum.

Hann finst eisini at Ráði teirra lesandi eftir álopið í Fregnum. Pauli Nielsen sigur, at Ráðið ikki hevur nýtt møguleikan at samskifta við leiðsluna, sum tað átti. Hann heldur, at ein broyting í hugburðinum seinastu árini hevur við sær, at næmingarnir ikki troyta teir møguleikar, teir hava at samskifta við leiðsluna á skúlanum.

## Nýggir tankar ella kaos

– Nýggir skúlatankar eru ógvuliga provokerandi, slær Pauli Nielsen fast. Tað kann vera ein av orsøkunum til, at næmingarnir ikki finna seg til rættis á skúlanum og halda, at einki skil er á nøkrum.

Hann sigur, at hesir tankar, ið hann sum fakfólk metir vera skilabestir, skulu út í blóðið hjá næmingunum. Hansara skúlatankar eru kanska orsøk til ósemjuna, sum hevur tikið seg upp.

Pauli Nielsen sigur, at grundleggjandi munur á hugsanunum um, hvussu ein læraraskúli skal arbeiða, liggja aftanfyri ónøgdina hjá Ráði teirra lesandi. Tað er eitt stríð millum traditionella uppfatan av undirvísing og so tað, sum er neyðugt at gera á einum læraraskúla.

– Eg eri fakfólk, og eg leggi dent á tey ting, sum eg haldi vera neyðug fyri at pedagogar og lærarar skulu duga fyri at vera førir fyri at røkja sína uppgávu.

– Vitan einsamøll flytir ikki mørk. Skulu komandi lærarar vera førir fyri at arbeiða øðrvísi í skúlanum, sum lagt verður upp til í lógini, so noyðast teir at hava roynt tey tingini í verki. Soleiðis at næmingarnir kenna tær mekanismur í einum verkætlanararbeiði, ístaðin fyri at sita og lurta, at vera yvirhoyrdur ella at gera okkurt, sum tú verður biðin um.

## Trongir karmar

Pauli Nielsen vísir ikki frá sær, at trupulleikar kunnu stinga seg upp. Hann nevnir, at høliviðurskiftini eru út av lagi vánalig, og tí gerast næmingar ónøgdir við viðurskiftini á skúlanum.

Ein kanning av Læraraskúlanum stendur fyri framman, og tí vil Pauli Nielsen ikki svara teimum spurningum, ið snúgva seg um fíggjarviðurskifti og eykajáttanina á Læraraskúlanum.

Næmingarnir skjóta upp, at leiðslan verður skift út. Tað liggur tó ikki fremst í huganum hjá Paula at taka seg aftur sum rektara, tí hann heldur seg ikki hava gjørt eitt vána arbeiði.



*Ein fegin Pauli Nielsen handar næmingi á Føroya Læraraskúla prógv eftir lokna skúlagongd. Hann heldur, at hansara skúlatankar kanska eru orsøk til ónøgd millum næmingar*

# Royndi at smugla marihuana

**Tollarar fangaðu mánadagin ein ungan mann, sum royndi at smugla marihuana til landið. Harumframt hevur løgreglan havt spirituskoyring at taka sær av**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Tá Norrøna mánamorgunin kom á Havnina, royndi ein 21 ára gamal maður at smugla narkotisk evni í land. Tollararnir fingu tó fatur á manninum, sum nú verður ákærdur fyri brot á narkotikalógina. Tollararnir góvu løgregluni boð um at handtaka mannin.

Talan var bara um fimm gramm av marihuana, sum bara var ætlað til egið brúk. Tí er revsingin heldur linari, enn um maðurin hevði havt sølu fyri eygað. Maðurin hevði fimm gramm uppi á sær, og hann kann vænta sær eina bót frá dómsvaldinum.

## Spirituskoyring

Sunnumorgunin var eitt ferðsluóhapp við Kjalnestanga í Kollafirði. Orsøkin til óhappið var, at førarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Trý ung vóru á veg úr Havn og koyrdu norðureftir við persónbili. Tá tey eru komin til Hósvíkar skifta tey førara, tí hann er ov fullur. Næsti førarin er heldur ikki koyriførur, og bilurin endar tí í bilverjuni framvið vegnum. Síðani sleppur tann triðji framat róðrinum, og tey koyra suðureftir aftur. Hesin førarin megnar heldur ikki at halda bilin á vegnum, og tey fara avaftur vegnum. Hetta upplýsir løgreglan. Øll trý verað tí ákærd fyri rúsdrekkakoyring.

Fríggjakvøldið fór ein persónbilur útav vegnum á Oyggjavegnum við Hotel Føroyar. Førarin, ið var einsamallur í bilinum, var ávirkaður av rúsdrekka.

## Herverk í bussi

Sunnudagin fekk løgreglan fráboðan um, at herverk varð framt á ein buss, sum stóð í Slættanesgøtu, nær við bilasøluna hjá Wenzel, ið selur Ford bilar.

Onkur hevði tømt ein eldsløkkjara í bussinum, og tí var pulvur um allan bussin.

Fríggjadagin var Jóansøkuhald í Sandagerði, har nógv fólk varð komið saman. Nakrir unglingar fóru til hendurs, og onkur endaði á skaðastovuni.


Búgvið í Caravan

Hugnið tykkum í Skotlandi



**Atlantic Airways Caravan í Nairn.**
Vit hava tveir ekslusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar. Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.
Nossligu og vælútgjørdu vognarnir eru heilar 42 fermetrar og hava umframt allan vanligan útbúnað, alskyns hentleikar so sum: sjónvarp, video, stereoanlegg, mikroovn, føroyskar leikur, -bøkur og -videobond. Knýtt at økinum er spælipláss, svimjihylur (innandura), hitarúm, solarium, minigolf o.a.

**Nairn:**
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Morayfjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.



Vit hava tveir "Caravans", ein til 6 og ein til 8 persónar.

**Dømi:**
Frá hósdegi til hósdag.
Um 2 vaksin og 2 børn undir 12 ár ferðast saman.

Við í prísinum er flog- og tokferð, gisting og køliskápið er fult við mati tá ið tit koma.
Galdandi frá 31.mai - 02. juli.

8.528,-*

**Prísir fyri hvønn um:**
6 ferðast saman: 2.627,-*
8 ferðast saman: 2.470,-*

*) Ferðaavgjald sum í løtuni er kr.474,- fyri vaksin og kr. 354,- fyri børn kemur afturat prísinum.

SANSIR · TEL 355 355

MB-Tours
Tel: 32 21 21 · Fax 32 21 22

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo